# Enskt C

*Endamálið*

**1**. Endamálið við undirvísingini er, at næmingurin mennir teir fýra málførleikarnar: at lurta, at tosa, at lesa og at skriva, og at hann økir málsligu og mentanarligu vitan og tilvitsku sína um Stóra Bretland og enskmælt øki.

*Undirvísingin*

**2.** Næmingurin skal

1. skilja fjølbroytt enskt mál í skrift og talu,
2. duga at málbera seg rætt munnliga og skrivliga á fjølbroyttum máli, í almennum, mentanarligum, samfelagsligum og vinnuligum viðurskiftum,
3. duga at lýsa og greina fagurbókmentir eins og og sannsagnir,
4. duga at málbera seg rætt í einfaldum samfelagsligum og vinnuligum høpi,
5. duga at lýsa og gera viðmerkingar til almenn, samfelagslig og vinnulig viðurskifti í ensktmæltum londum,
6. prógva vitan um munir og líkleikar millum mentanarlig viðurskifti í Føroyum og í útvaldum ensktmæltum økjum og
7. duga at nýta viðkomandi framløguhættir.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1** Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram á enskum. Tekstirnir fevna um ymisk tekstasløg og torleikastig og um bæði nýggjar fagrar bókmentir og løtubærar sannsagnartekstir. Umframt kunningartøkni kunnu aðrir miðlar enn teir prentaðu nýtast í undirvísingini, eitt nú myndir, filmir og sjónvarpssendingar. Hvør pultstími, har undirvíst verður við hesum miðlum, verður umroknaður til 2 normalsíður í lesipensum, tó í mesta lagi 15 normalsíður.

**3.2** *Tekstalestur*
Næmingurin skal lesa eitt fjølbroytt úrval av løtubærum sannsagnum, herundir vinnuligar og samfelagsligar tekstir, og fagrar bókmentir frá nýggjari tíð (seinastu 50 árini) innan tekstasløgini skaldsøgu, stuttsøgu, sjónleik og yrkingar. Næmingurin skal lesa í minsta lagi 150 ns, umleið helvtin sannsagnir (íroknað vinnuligir tekstir og verkætlan) og helvtin fagrar bókmentir. Eini 3-5 evni eru partar av undirvísingini. Eitt evni er at skilja sum ein samanhangandi eind av

bókmentarligum og/ella sannsagnarligum tekstum. Eitt evni skal vera um vinnulívið í ensktmæltum høpi.

**3.3** *Verkætlan*

Eitt av evninum í tekstalestrinum er skipað sum ein einsæris verkætlan, ið viðger almenn, vinnulig, samfelagslig ella mentanarlig viðurskifti í einum ensktmæltum øki. Í sambandi við verkætlanina skrivar næmingurin eina ritgerð, sum í vavi er umleið 5 A-4 ørk av teksti.

**3.4** *Málførleiki*

Munnligi førleikin, herundir málbering og úttala, verða ment í ymiskum undirvísingarhøpum, t.d. samrøðu, orðaskifti, lutaleiki og næmingaframløgu.
Skrivligi førleikin verður mentur við, at næmingurin skrivar uppgávur um vinnulig, samfelagslig og mentunarlig viðurskifti svarandi til 8 uppgávur, sum í vavi svara til próvtøkuuppgávur. Av hesum skal umleið helvtin vera próvtøkulíknandi uppgávur. Herumframt letur næmingurin inn 12 smáar uppgávur. Lærarin rættar og ger viðmerkingar til uppgávurnar. Upp til 25% av arbeiðnum við skrivligum heimauppgávum kann nýtast í undirvísingini til ávegisskriving.
Bæði skrivligi og munnligi førleikin verður styrktur við arbeiðinum við grundleggjandi málløru.

**3.5** *Málfatan*

Í undirvísningini verður arbeitt við enskum brúkt sum móðurmál og sum altjóða samskiftismál.

*Próvtøkan*

**4.** Hildin verður ein munnlig og ein skrivlig próvtøka

**5.1** Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring á enskum í einum lisnum og einum ólisnum teksti. Próvtakarin fær umleið 30 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**5.2** Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp 100 ns umframt verkætlan. Av hesum skulu í minsta lagi 40 ns vera fagrar bókmentir, ið fevna um í minsta lagi 2 tekstasløg. Herafturat verða í minsta lagi givnar upp 40 ns av sannsagnum, og í minsta lagi 20 ns av hesum skulu vera vinnuligir tekstir.

**5.3** Fyri sjálvlesandi og næmingar, sum fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**5.4** Til fyrireiking og próvhoyring skal próvtakarin hava útflýggjað rein eintøk av teimum tekstútgávunum, sum eru givnar upp í lesipensum. Í fyrreikingarrúminum kann próvtakarin nýta egnar uppskriftir og teir orðalistar, sum eru útflýggjaðir í sambandi við undirvísingina, umframt allir teir tekstir, sum eru tilskilaðir í lesipensum. Til tess at styðja framløguna kann próvtakarin undir próvhoyringini

brúka tær uppskriftir, hann hevur gjørt í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplesturs telur ikki positivt í dømingini.

**5.5** Próvtakarin verður fyrst próvhoyrdur í lisna tekstinum/verkætlanini, og hann skal greiða frá innihaldinum í tekstinum/verkætlanini og síðan lýsa og greina evnið. Í ólisna tekstinum skal próvtakarin endurgeva høvuðsinnihaldið í tekstinum og gera viðmerkingar um hann. Próvhoyrarin velur ólisna tekstin, sum er ein sannsagnartekstur, og sum í vavi er umleið 350 orð.

**5.6** Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin dugur at bera týðandi tættir í tekstinum fram á røttum og fjølbroyttum enskum máli, og at úttala og málburður ikki tarnar samskiftinum.

**6.** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.

**7.1** Til skrivliga próvtøkuna, sum er 4 tímar, skal próvtakarin svara hesum 3 lutaruppgávunum:

a) Við støði í einum sannsagnarteksti, umleið 500 orðtil støddar, um almenn, vinnulig, samfelagslig og mentanarlig viðurskifti svara einum ella fleiri spurningum á enskum.
b) Umseta ein tekst, umleið 100 orðtil støddar, um almenn, vinnulig, samfelagslig ella mentanarlig viðurskifti úr føroyskum/donskum til enskt.
c) Skriva eitt bræv ella eina innanhýsis frásøgn (memo) á enskum við støði í einum uppriti á enskum.

**7.2** Til skrivligu próvtøkuna er loyvt at nýta allar hjálparmiðlar.

**7.3** Í próvdømingini verður dentur lagdur á, hvussu próvtakarin í øllum 3 uppgávu-svørunum megnar at nýta enska málið, herundir um hann er stinnur í stavseting, orðatilfari, málllæru, og at hann dugur málbera seg rætt og greitt.

**8.** Givið verður 1 próvtal fyri skrivliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.